# Samdráttur av søguni hjá Meginfelag áhugaleikara Føroya (MáF) á 40 ára degnum 23. september 2019

MáF varð stovnað 23. september 1979. Áðrenn hetta var í 70´unum tosað innan sjónleik í Føroyum, at sjónleikarfeløgini áttu at skipa seg í eitt meginfelag. Orsøkin var m.a., at yrkisbólkurin Gríma var settur á stovn í 1977, og tá var sjónleikurin í Føroyum á fyrsta sinni býttur upp í tveir partar: yrkisleik og áhugaleik.

Ein norðurlendsk sjónleikarráðstevna, sum var hildin á Álandi í 1978 fyri áhugaleik, var síðsta skumpið, ið skuldi til, fyri at MáF var stovnað. Bjørn Lønegren úr Finlandi skipaði fyri ráðstevnuni og var tann, sum bjóðaði umboðum fyri føroysk sjónleikafeløg at koma við á stevnuna. Hini Norðurlondini vóru tá øll skipað í meginfeløg. Úr Føroyum fóru Jóhan Seier Hansen, Olivur og Margreta Næss úr Havnar Sjónleikarfelag og Jógvan Ósá úr Klaksvíkar Sjónleikarfelag og Steinbjørn í Dali. Á hesari ráðstevnu varð avgerðin tikin um, at nú var tíðin komin til at seta eitt meginfelag fyri áhugaleik á stovn í Føroyum

Heimafturkomin úr Álandi settu Olivur Næss og Oskar Hermansen úr Havnar Sjónleikarfelag og Hans David Matras úr Klaksvíkar Sjónleikarfelag seg saman og gjørdu uppskot til lóg fyri meginfelagið og kallaðu síðani inn til stovnandi aðalfund tann 23. september 1979. Meginfelag áhugaleikarafelag Føroya varð stovnað.

Í fyrstu nevndini vórðu vald: Gulla Øregaard, Sverri Egholm og Oddvá Nattestad úr Havnar Sjónleikarfelag og Jógvan E. Ósá og Suni Svabo Samuelsen úr Klaksvíkar Sjónleikarfelag. Nevndin skipaði seg við Jógvani E. Ósá sum formanni, Gullu Øregaard sum næstforkvinnu, Suna S. Samuelsen sum kassameistara og Oddvu Nattestad sum skrivara. Fimm limafeløg vóru í nýstovnaða meginfelagnum, og tey vóru úr Havn, Klaksvík, Tvøroyri, Hvalba og av Strondum.

Longu í 31. mai 1980 gjørdist MáF limur í norðurlendska meginfelagnum NAR – Nordisk Amatørteaterråd. Hetta hendi í Bø í Telemarken í Noregi. Helga Hjørvar úr Íslandi var forkvinna. Jógvan Ósá og Oddvá Nattestad vóru til staðar, tá limaskapurin gjørdist veruleiki. Eftir hetta luttók MáF á fleiri ráðstevnum og aðalfundum, sum NAR skipaði fyri, og ein av hesum aðalfundum varð hildin í Føroyum miðskeiðis í 80´unum.

MáF fór frá byrjan beinanvegin í gongd við at skipa fyri sjónleikaraskeiðum, har áhugaleikarar kundu menna sínar førleikar. Eitt nú kann lesast í einari grein í Tingakrossi frá 8. Mai 1981, at MáF skipar fyri einum sjónleikaraskeiði í Sjónleikarhúsinum, ið umfatar klassiskan sjónleik, nútímans sjónleik og teiti og skemtileik. Umframt skeiðir o.ø. í Føroyum, hevur MáF eisini skipað fyri luttøku á skeiðum, festivalum og ymiskum sjónleikatiltøkum uttanlands fyri limir sínar.

Í august 1983 skipaði MáF fyri einum norðurlendskum ungdómsskeiði, sum var hildið í Norðurlandahúsinum, ið var tikið í brúk 8. mai sama ár. Evnið var kvæðið " Ólavur Riddararós", sum skuldi flytast til sjónleik. Tey flestu ungu úr Føroyum, sum luttóku á nevnda ungdómsskeiði gjørdu seinni vart við seg í listarliga umhvørvinum í Føroyum. Millum lærararnar á nevnda skeiði var Helga Hjørvar úr Íslandi, sum seinni gjørdist stjóri í Norðurlandahúsinum. Tað finst ein bóklingur (sí leinkið), sum sigur frá nevnda skeiði. Her kann lesast um arbeiðsgongdina, og um hvørjir luttakararnir vóru.

NAR broytti seinni navn til NEATA orsakað av víðkaða samstarvinum við Baltalondini (Estland, Letland og Litava). Í byrjanini fingu sjálvstýrandi økini Føroyar, Áland og Grønland limaskap uttan umboð í stýrinum. Seinni varð hetta broytt til, at økini valdu ein stýrislim í felag. Í dag virkar NEATA sum ein meginfelagsskapur, har meginfeløgini fyri áhugleiki úr hvørjum landi eru limir á jøvnum føti.

Í 1999 gjørdist MáF limur í IATA – International Amateur Theatre Association – á aðalfundi hjá altjóða áhugaleikarafelagsskapinum. Fundurin varð hildin í býnum Al Jadida í Marokko. Oddvá Nattestad var til staðar á fundinum. Sigrún Valbergsdóttir úr Íslandi sat í sjálvari nevndini í IATA og hevði arbeitt við lógaruppskoti, so at sjálvstýrandi lond eisini kundu gerast limir, og hetta varð samtykt á aðalfundinum. Í somu støðu sum Føroyar var eisini Aruba, sum var sjálvstýrandi partur innan Holland, og sum eisini gjørdist limur á fundinum.

Í einari grein frá 2. november 1996 hevði Dimmalætting samrøðu við táverandi formannin í MáF, Sverra Egholm, har hann m.a. greiðir frá, at 14 limafeløg eru í MáF, sum so at siga øll eru virkin. Hann sigur eisini, at sjónleikalívið úti á bygd áður var treytað av einstaklingum við serstøkum sjónleikagávum, og tá hesi fólk ikki vóru virkin meira, fór sjónleikurin við teimum. Men nú eru feløg til at røkta hesa mentanina.

Orðini hjá Sverra Egholm eru enn í dag líka týðandi. Sjónleikarafeløgini eru sera týdningarmikil í arbeiðinum at halda lív í áhugaleiklistini, og ikki minst hava eldsálirnar úti í teimum einkultu feløgunum ómetaligan týdning. Og sum tað liggur í orðinum áhugaleiklist, er hetta ein listagrein, har kjarnan er áhugi, og har áhugaleikararnir leggja eitt stórt ókeypis arbeiði eftir sær.

Ígjøgnum hesi 40 árini hevur MáF havt seks nevndarformenn og kvinnur. Jógvan Ósá sat sum formaður frá 1979-1980. Gulla Øregaard frá 1980-1986. Sverri Egholm frá 1986-1999. Poulina Jensen frá 1999-2000. Hilmar Joensen frá 2000-2015. Og núverandi nevndarforkvinna Noomi S. Reinert hevur sitið síðan 2015.

Á 40 ára stovningardegnum hjá MáF 23. september 2019 eru átta limafeløg í MáF: Havnar Sjónleikarafelag, Klaksvíkar Sjónleikarafelag, Sjónleikarafelagið Glotti (Gøta), Suðuroyar Sjónleikarafelag, Ungmannafelagið Royndin (Nólsoy), Ungmannafelagið Virkið (Sandoy), Bygdarfelagið Eydnan (Oyrarbakka) og Dramaverkstaðið (Tórsahavn). Flest teirra eru virkin við leikuppsetingum á hvørjum ári umframt kabarettum.

Høvuðsendamálið hjá MáF er framvegis tað sama, sum tá meginfelagið var stovnað í 1979 – nevnliga at stuðla og menna áhugaleiklistini í Føroyum.